

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 06 - 2012

# Verkfall kostar oljuvinnu 150 mió. um dagin

Umleið 700 limir í fakfeløgunum SAFE, Industri Energi og Lederne, sum arbeiða í norsku oljuvinnuni, eru farnir í verkfall, eftir at samráðingar millum feløgini og Oljeindustriens Landsforending slitnaðu í nátt. Tey, sum eru farin í verkfall, arbeiða hjá Statoil, BP og ESS. Ósemjan millum fakfeløgini og arbeiðsgevararnar snýr seg um pensjónsviðurskiftini hjá limunum í feløgunum. Fakfeløgini vilja hava spurningin um pensjónina við í tær vanligu sáttmálasamráðingarnar, men tað vil landsfelagið ikki. Landsfelagið vísir á, at pensjónirnar hava ikki verið partur av sáttmálasamráðingunum líka síðani 1989, og tí er kravið hjá fakfeløgunum órímiligt, sigur OLF. Norska kringvarpið sigur, at pallarnir á Oseberg og Heidrun noyðast at steðga framleiðsluni orsakað av verkfallinum, men at tað fara at ganga fýra ella fimm samdøgur, áðrenn framleiðslan har steðgar. Ídnaðarstøðin á Tjeldbergodden fær sítt gass frá Heidrun og steðgar tí eisini, sigur NRK. Harafturat ávirkar verkfallið fyrireikingarnar á Skarv-leiðini. Framleiðslan har skal eftir ætlanini byrja í heyst, men verkfallið kann gera, at tað má útsetast. Dýrt verkfall Jan Hodneland, sum er samráðingarleiðari hjá Oljeindustriens Landsforeng, sigur við NRK, at verkfallið fer at kosta umleið 150 milliónir krónur um dagin. -So tað ganga bara nakrir dagar, til missurin fer upp um eina milliard krónur, sigur hann. Kjetil Hjertvbik hjá OLF sigur, at øll verkføll og serstakliga tey í frálandavinnuni eru álvarssom og kunnu fáa ovurstórar fíggjarligar avleiðingar. Hann dugir ikki at siga, um verkfallið verður drúgt, men leggur áherslu á, at hjá OLF eru pensjónsviðurskifti ikki partur av lønarsamráðingum.